# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# HÚKURIN OG FERÐSLUTRYGDIN

Myndugleikin hevur nú talað: Húkurin skal flytast úr rundkoyringini í Klaksvík. Hesi vóru boðini, sum Klaksvíkar kommuna fekk frá Landsverki fríggjadagin.

Landsferðslunevndin, sum er sett saman av serkønum fólki frá Landsverki, Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Akstovuni og Løgregluni, hevur viðgjørt málið, og við hjálp frá einum donskum ferðslutrygdargrannskoðara eru tey komin til ta niðurstøðu, at húkurin setur ferðslutrygdina í vanda.

Tað er sjálvsagt gott, at avvarðandi myndugleikar hava ferðslutrygdina í huga og byrgja so væl fyri, sum til ber. Kortini tykist hendan avgerðin heldur margháttlig - tí hon er ikki so løtt at skilja.

Sagt verður, at avgerðin byggir á null-hugsjónina - sum hevur tað bariliga endamál, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligan skaða í ferðsluni. Tað var løgtingið, sum gjørdi hesa samtykt fyri nøkrum árum síðani, og ein avleiðing av hesi avgerð løgtingsins er, at í ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar er tann grundhugsjón galdandi, at »vegakervið skal vera fyrigevandi«, skrivar Landsverk í grundgevingunum.

Tá tað er sagt, so kunnu vit ikki lata vera við at spyrja, hvat Landsverk og landsferðslunevndin halda um ymisk onnur viðurskifti. Er tað til dømis í lagi, at órógvandi handilslýsingar standa millum ljóskurvarnar í Havn? Er tað virkuliga í lagi, at handilsfólk skulu sleppa at órógva bilførarar við eitt nú tekkiligum kvinnubróstum, meðan tey í nøkur fá sekund sleppa at koyra gjøgnum grønt ljós - og meðan fótgangarar eru á vegnum?

Viðhvørt tykjast avgerðir inkonsekventar - serliga tá so myndugleikar fara at skylda upp á hvønn annan. Tað kann ikki passa, at húkurin í Klaksvík skal órógva meira enn lýsingarnar í Havn. Gott nokk fara bilførarar ikki at koyra á handilslýsingarnar, men tær kunnu órógva so nógv, at ólukka kann standast av, tí nógv fólk eru til gongu á vegnum, meðan bilarnir koyra.



Tað hevði verið áhugavert at fingið at vitað, hvat ferðslutrygdargrannskoðarin hjá Landsverki heldur um hesi viðurskifti, sum væl kunnu sammetast.

Vit kunnu bert sanna orðini hjá Róa Patursson á sinni, at »tað lekur millum teori og praksis«...

**» Er húkurin í Klaksvík størri vandi enn lýsingar í ljóskurvum í Havn?**

## Ekstrablaðið vitjaði Sosialin

Um vikuskiftið hevði Sosialurin vitjan av leiðsluni á danska Ekstrabladet.

Poul Madsen er ábyrgdarblaðstjóri á Ekstrablaðnum, og undir vitjanini á Sosialinum varð tosað um journalistikk - við serligum denti á blaðframleiðslu í mun til skjótu miðlarnar. Umframt at skriva Sosialin, so røkja blaðfólkini í Miðlahúsinum eisini tíðindini á Rás2 og á Portalinum, sum er nógv mest vitjaða heimasíða í Føroyum.

Ekstrablaðið hevur eisini mest vitjaða heimasíðuna í Danmark, www.eb.dk, og hóast tey onga útvarpsstøð hava, so gera tey nógv burtur úr sjónvarpi á netinum, og tann parturin varð sum vera man eisini nógv umrøddur.




*Poul Madsen, ábyrgdarblaðstjóri á Ekstrablaðnum*

## Traðka á samkynd í Føroyum



Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðfrúa í Íslandi, vildi á føroyaferðini í síðstu viku ikki gera viðmerkingar til serligu heilsanina frá Jenisi av Rana - um at vitjan hennara og konu hennara í Føroyum var ein provokatión.

Men tá hon kom aftur til Íslands segði hon við íslendska kringvarpið, at í Føroyum verður traðkað á viðurskiftini hjá teimum samkyndu.

- Um vitjan mín kann varpa ljós á hetta, so er kortini okkurt gott komið burturúr, segði hon.

*Tað er snópisligt, at føroyingar av útlendingum skulu setast í bás eftir lægsta felagsnevnaranum - teimum homofobisku!*

*Men tað var eisini ov vánaligt av Jóhonnu Sigurðardóttir ikki at siga sína hjartans meining við føroyskar miðlar, áðrenn hon fór heim til Íslands at finnast at føroyingum.*



**» Gjalda fyri betri bussleið**

ODDVØR JOHANSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**» Tingfólk vilja niður í løn?**

GERHARD LOGNBERG
KJAK Á SÍÐU 12

## 17 stig í Klaksvík

Tað hevur verið nógv lítt lágæœttarlot og vindur í seinastuni.

Ja, tað hevur verið undarliga heitt í mun til árstíðina, nú bert ein mánaður er eftir, til fjøllini verða gingin.

Síðsta hósdag varð ikki hevði staðið á síðan fyrrapartin.




*So lýtt var tað í Klaksvík hósdagin*
*Mynd: Dávur Winther*

## So boðar hann frá kava

Veðurmaðurin í Miðlahúsinum, Petur Skeel Jacobsen boðar nú frá kava.

Hóast vit omanfyri kunnu skriva, at hitin kom upp í 17 stig í Klaksvík seinasta hósdag, so boðar Petur Skeel nú frá kava.

Hann sigur, at fríggjadagin og leygardagin verður hvassur vindur ella skrið av norði og ælingum, sum partvís verður sum vátakava. Út á leygardagin verður minni vindur og yvirhøvur turt, og tá verður hitin millum trý og sjey stig.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*